## DAGSINS MEINING

# Ein syndarlig støða

Tað er ein syndarlig støða, ið ræður í New Oreleans eftir flóðvanlukkuna har. Fólk í túsundatali eru druknað, hús eru rapað og býurin stendur lutvíst undir vatni. Tá vanlukkan hendi gekk skeivt alt, sum kundi ganga galið. Myndugleikarnir vóru ikki mentir at útvega øllum kollektivan flutning. Hetta merkti, at tey, sum ikki áttu bil, sluppu ikki til rýmingar í nóg góðari tíð. Hesi neyðars menniskju vóru sostatt latin til eina ræðuliga lagnu. Tey, sum ikki druknaðu, vóru eftir á húsatekjum, har tey hava verið uttan mat og vatn í fleiri dagar.

Tað eru tey fátøku í New Orleans, ið ikki hava bil, sum eru ofrini kann heimspressan boða frá. Tey flestu, sum sostatt vóru slept uppá fjall, eru tey fátæku og tí verður vanlukkan ein ímynd uppá ta sosiala órættvísi, ið ræður í USA. Fylgjurnar av ræðuligu vanlukkuni stava eisini fyri ein part frá hesum, at tað almenna í USA hevur ein so løgnan leiklut í samfelagnum. Í USA er hvør sín egni eydnusmiður. Her skal statsvaldið hava so lítlan leiklut sum møguligt. Ein fylgjan er, at almenna tænastustøðið er lágt, um samanborið verður við t.d. Norðurlond. Almenn anlegg eru niðurslitin og vanrøkt. Eitt syrgligt dømi eru tær byrgingar, ið skuldu verja New Oreleans móti havinum. Tær vóru alt ov veikar og nógv bendir á, at myndugleikarnir hava vitað um hetta í mong ár.

Afturat hesum kemur so tann ruðuleiki, ið hevur valdað, síðan vanlukkuna. Hetta, at allir normalir normar fyri einum heiðurligum sosialum samfelagsatburði svíkja í eini katastrofustøðu er eitt sjúkueyðkenni. Hetta avdúkar, at stórir samfelagsbólkar kenna seg settar uttanfyri samfelagið í gerandisdegnum. Tí svíkur samhaldsfestið í katastrofuumstøðum. Hetta vildi ikki hent í einum vælferðarsamfelag. Hetta átti alt at givið amerikanskum leiðarum nakað at hugsa um. Hetta at heimsins ríkasta land ikki megnar at veita sínum borgarum eitt minstamát av trygd vísir, at nakað er grundleggjandi skeivt.Eisini vit eiga at hugsa um hetta og sýna samhaldsfesti og tí eiga eisini Føroyar at fara in við fíggjarligum stuðli, hóast vanlukkan er hend í heimsins ríkasta landi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hví siga: »SAS-ligan« og »TIPPI-ligan«, men ikki »FORMULA-deildin«?

**Heri Simonsen**



Vit sum trúliga lurta eftir ítróttartíðindum og ítróttarsendingum í Kringvarpinum, hoyra javnan vertirnar í ítróttarsendingunum reklamera/lýsa fyri skandinaviska flogfelagnum, SAS og fyri norsku almennu veddingar-fyritøkuni, NORSK TIPPING. Kringvarpið sigur frá úrslitum og tíðindum frá "SAS-liguni" í Danmark, og "TIPPI-liguni" í Noregi. Tí vil eg stilla Jógvani Jespersen, kringvarpsstjóra nakrar spurningar. Hví reklamera/lýsa tit fyri skandinaviskum fyritøkum, so sum Norsk Tipping og SAS í ítróttarsendingum, men ikki fyri einari heimligari fyritøku, sum FORMULA.FO? Eru tað kanska SAS og Norsk Tipping, sum eru við til at menna føroyskan fótbólt, og ikki FORMULA.FO?? BBC var fyrsta útvarpsstøð í heiminum. BBC byrjaði sítt "Public-service" virksemi í 1921. BBC Radio hevur verið stóra fyrimyndin hjá DR (stovnað 1925), og NRK (stovnað 1926), og er væl eisini stóra fyrimyndin hjá ÚF. Men hóast BBC Radio er elsti "Public-service" miðil í heiminum, so lesa tey á BBC 5 LIVE (MW 693 og 909) úrslit og tíðindi úr "Barclay´s Premiership", "Coca-cola Championship", "Bell´s Scottish Premier League", "Carling Cup" o.s.fr. Tá stóra og elsta "Public-service" fyrimyndin, BBC sigur øll hesi sponsor-heitini í sínum ítróttartíðindum og frásagnum, hví kann Kringvarpið so ikki siga: "Formula-deildin" ella "Coca-cola steypakappingin"??

# Ger tína egnu lønarhækkan

**Jógvan í Løðuni**
*Eiði*



Hvussu hevði tað verið sjálvur at kunna gjørt sína egnu lønarhækkan, uttan samráðingar ella stríð - tvætl ella møguligur verulеiki?

Ikki tvætl, men møguleiki. Ein so góður møguleiki at talan kann verða um 5% lønarhækking ár undan ári.

Hendan lønarhækkanin er trygg og nógv drúgvari enn ein 5% lønarhækking yvir 2 ár t.v.s 2.5% um árið, minus 40% beinleiðis til skattin, ella 1.5% nettu hækkan. Í krónum 4.500 um árið, móti tí sjálvgjørdu lønarhækkingini kr. 15.000 um árið, um maður og kona hava inntøku kr. 150.000 í part.

Er talan um inntøku tvær ferðir kr. 250.000, fær húsarhaldið kr. 25.000 meira um árið, heldur enn hinar 7.500 krónurnar. Er eingin lønarhækking virkar skattafyrimunurin fult.

Hvar er so hesin møguleikin - hann verður galdandi beinanvegin fyri tann, ið er undir høgum skatti og gerst skattaborgari í Eiðis kommunu.

i Sosialurin

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.